VIÐMERKINGAR

# Málval

**Stella Zachariassen**
*Argir*



Sjálvt um tað eru 3 vikur síðani at flóðaldan oyðilegði ein stóran part av heimlandið mínum, so er sárið sera fríkst enn, og sum sagt fyrr so fari eg til Sri Lanka um miðan februar.

Ætlanin var at opnað eitt barnaheim, men av tí at stjórnin á Sri Lanka hevur broytt reglarnar viðvíkjandi adoptión, so verður einki gjørt við tað inntil øll børn eru niðurskrivaði tí at sera nógv børn vera misbrúkt kynsliga ella burturflutt.

Mítt hjarta er enn hjá hesum børnum, sum í stóran mun hava brúk fyri hjálp.

Tey hava ongan møguleika at fáa sær arbeiði og eru ikki sterk nokk at siga nei ella verja seg ímóti teimum, sum gera ónt. Hetta er tí at vit mugu gera okkurt, serliga í hesum tíðum tá vit kanska ikki hava nakað, tá er tíð at geva av tí tað er tá vit geva alt vit hava.

Grundin til at eg skrivi hetta bræv er henda, at ídag fáa londini alla hjálp tey hava tørv á, men hvat so um ein mánaða ella tveir. Fer alt hetta at verða gloymt? Tí er tað at eg geri planir um at fáa familjur her at stuðla familjur á Sri Lanka hvønn mánaða eftir førimuni, inntil familjurnar á Sri Lanka eru komnar upp á føtur aftur. Peningurin sum fer at koma inn fer til at sikra familjum, teimum fáu sm vit fáa hjálpt, til at fáa hús, heim, skúlagongd o.s.v. Klæðir og mat kunnu tey altíð fáa, og tí heiti eg á tykkum ikki at senda klæði og mat, tí klæðini tey eru í eru ikki tey vit brúka her og maturin er sera annaleiðis. Heldur vil eg heita tykkum á at flyta pening.

T.d. kunnu 20 kr. brúkast til at keypa 2 t-shirts ella mat til 4 dagar.

Eg vil eg staðfesta at peningurin sum kemur inn ikki fer til mína fer, men óskorðin til hjálpina. Pápi mín, sum er á Sri Lanka er í fer við at kanna møguleikar hvussu vit kunnu byggja hús til tær familjur, sum hava tørv á tí.

Sjálvandi kunnu vit ikki nøkta tørvin hjá øllum, men vit kunnu hjálpa nøkrum og tað ger mun.

Í síðsta skrivi, segði eg at um nakar hevði hug at koma við, so kundu tey ringja og tað hava nógv gjørt, men av tí at lógirnar eru broyttar á Sri Lanka nú, so má eg fara fyrst yvir nú og so verður gjørdur ein plan til at fara yviraftur til summarið og tá kunnu tey í hava hug koma við.

Eg fari tær næstu vikurnar at skriva nøkur lesara-

*Framhald á síðu 12*

# Sjálvandi skal kappingin vera frí

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Eftir at Atlantsflog í eina tíð hevur verið einasta flogfelag, ið hevur havt regluliga flúgving millum Føroyar og Danmark, hevur eitt annað flogfelag (DAT) nú eisini bjóðað seg fram á hesi rutu.

Í samrøðu við Dimmalætting 3. januar, sigur stjórin í DAT, Jesper Rungholm, at av teimum 500 sum ferðaðust við teirra flogfari um jólini, vóru millum 200 og 300 sum annars ikki høvdu farið út at ferðast, um tey ikki fingu tilboðið frá DAT. Tey fóru avstað vegna lága prísin.

Tað er gleðiligt, at fólk, sum annars ikki høvdu ráð til at vitja heim á klettarnar á jólum, nú kortini fingu henda gylta møguleikan. Samtíðis kunnu vit fegnast um, at stóra undirtøkan sum DAT hevur fingið, nýtist als ikki at merkja eina tilsvarandi afturgongd fyri Atlantsflog, tí samlaða ferðafólkatalið økist, tá tilboðini gerast fleiri.

Men nú skilst á samrøðuni, sum Dimmalætting hevði við stjóra í DAT, at ivasamt er, hvussu verður við Føroyaflúgvingini hjá felagnum í framtíðini. Stjórin vísir á, at kappingin á Føroyarutuni er ikki frí, eins og í restini av Evropa. Tað eru myndugleikarnir sum geva loyvi til flúgvingina, og eisini kunnu teir áseta, hvussu nógvar fráferðir kunnu vera. Harumframt skulu ferðaseðlaprísirnir góðkennast av myndugleikunum.

Aðrastaðni í Evropa fáa flogfeløg bót, um tey seta marknaðarkreftirnar til viks, men hjá okkum er støðan júst tann øvugta. Her er tað ein treyt fryi at sleppa at flúgva, at bæði prísir og tal av fráferðum eru avtalaði frammanundan. Hesum mugu vit koma burtur frá sum skjótast, tí taparin av hesum er kundin.

Sjálvandi skal kappingin vera frí.

# Berghol til Dals

**Gerhard Lognberg**
*Løgtingsmaður*



1) Hoyrdi í fjølmiðlunum, at man visti ikki hvussu bleiv við tunnulsgerð ímillum Húsavík og Dal. Heldur ikki um peningurin fór at røkka til at projekterað fyri í ár. Hetta vóru úttalilsir frá stjóranum á Landsverki.

Eg skal gerða viðmerkingar til hetta. Í 2004 var peningur játtaður til kanningar av tunnilsgerð ímillum Húsavík og Dal. Men tað sum hendi, var at Landsverk kom so seint í Sandoynna at arbeiða. Sostatt blivu teir ikki lidnir við forkanningarnar.

Hetta eiga dalbingar ikki at svíða fyri, tað sær soleiðis út eftir útalisinum.

Í hesum árinum - altso 2005, er ein millión avsett til at projekterað arbeiðið við, og tað er eisini tað sum eg fyrihaldi meg til, soleiðis at hetta arbeiðið kann byrja sum skjótast.

Vælsaktans kunnu vit ikki bjóða dalbingum eina farleið, sum er beinleiðis vandamikil at ferast eftir. Har ið tað er dagligur kostur, at vegurin næstan loysnar undan akfarinum.

### Ávirkan

2) Annars sær tað ikki út til, at Sandoyggin hevur møguleikan leigi avtrat at ávirka nakað í gjøgnum Løgtingið.

Tá ið eg havi hoyrt mín góða vin, Jógvan við Keldu gramt seg um at valskipanin má broytast, tí tað er synd í Tórshavn. Teir fáa ov fá umboð vald inn á ting, sostatt eru teir ov illa umboðaðir í tinginum.

Haraftur ímóti kann Sandoyggin væl verða umboðan á tingi fyri uttan. Slík úttalilsir falla mær fyri brósti. Tórshavn sum flýtur í mjólk og hunangi hevur onga neyð, hvørki so ella so, Jógvan.

Nei, royni tit heldur at menna útjaðarin, heldur enn at avvápna hann heilt, soleiðis at eisini røddirnar, sum skulu halda skansan á tingið skulu tagna.

Eg vóni at veljarin skrivar sær aftan fyri oyra, hvørjar røddir á tingið vilja avvápna útjaðaran, fyri at fáa eitt enn sterkari miðstaðarøkið.

Eitt dømi. Í skrivandi løtu.

3) Tað er ein góður mánaði síðani eg sá okkara nýggju skútu "Teistan".

Skipið bleiv tikið úr siglíng í jólamánaðinum. Síðani hevur eitt avloysaraskip silgt um Skopunarfjørð, sum eftir míni meining er óegna. "Teistin" er alt ov nógv úr sigling.

Sandoyggin og Suðuroyggin liggja soleiðis fyri, at tær mugu hava gott flutningssamband, tann møguleikan mugu útoyggjarnar eisini hava.

Prísurin til flutning eigur ikki at gerða hesar oyggjar minni kappingarførðar.

Liðugt vøra av flakavirkjum, eigur at fáa flutningsstuðul.

Eg kann t. d. nevna, at tá ein keypur eina bingju av lidnari vøru úr Sandoynni, so er henda vøra í bingjuni uml. kr. 3.000,- dýrari enn á meginlandinum. Er hetta minni nøgdir, er prísurin hægri.

Til síðst, latið okkum sum stýra hesum landið royna at hjálpa útjaðarinum.

Heldur enn at brúka orku uppá at leggja bein fyri hann, við tí ætlan at styrkja miðstaðarøkið.

# Rættleiðing til RFF um motorsúkkurnar

**Nevndin í Føroya-MC**

Leiðarin fyri RFF hevur í bløðunum 5. jan ár eina viðmerking til tað sum Føroya-MC førdi fram um avgjaldsmálið, og lat tað verða sagt beinavegin, at tað var ikki meiningin at fáa eitt blaðkjak burturúr men m.a. at vísa á at Føroya-MC, (sum allerhelst restin av Føroya fólk) eisini gongur inn fyri nullhugsjónini um at eingin skal doyggja í ferðsluni. Tó vil tað ikki siga at vit eru 100% samd í, hvat Jón Kragesteen førir fram, men at vit hava sama mál og ymiskar framfararhættir.

Tó mugu vit koma við einari rætting til nøkur av teimum hagtølum, sum JK leggur fram. Bitið var serliga merki í donsku tølini yvir deyð á motorsúkklu, sum í talvuni hjá JK, hevði nøkur stór sving uppeftir, serliga í 1999. Eftir at hava eftirkannað tey tøl, sum JK leggur fram, síggja vit, at tað als ikki samsvarar við tølini frá "sikkertrafik.dk", sum bæði RFF og Rådet for Større Færdselsikkerhed (DK) vísir á, tá tað kemur við hagtølum. Sí tabell.

lukku í Føroyum.

Um vit nýta tølini hjá JK sjálvum og siga, at í meðal koyrir ein bilur 15.000 km árliga, so svarar hetta til, at tað pr. bil ganga 680 ár til at tað hendir ein vanlukka.

Um ein motorsúkkla í meðal koyrir 3000 km pr. ár, svarar tað til, at tað pr. motorsúkklu ganga 200 ár til tað hendir ein vanlukka. Sostatt er tað ikki 16 ferðir vandamiklari at koyra motorsúkklu enn bili, men "bert" 3,4 ferðir so vandamikið.

Hvat hava vit so gjørt her? Hevur RFF gjørt tað ótryggari at koyra motorsúkklu og hevur Føroya-MC gjørt tað tryggari? Ella hava vit í heila tikið gjørt nakað ítøkuligt fyri at gera nakað sum helst tryggari? Í okkara verð hava vit bert víst á, hvussu tað ber til at nýta/misnýta hagtøl, sum ein vil.

Men hvat kunnu vit so gera, fyri at fáa ferðsluna tryggari? Sum vit nevndu í umtalaðu grein um avgjaldsmál, so meina vit ikki at tað er ein gongd leið at hækka avgjaldið á motorsúkklum, tí tá verður aldurin á súklum væntandi enn hægri enn í dag, og motorsúkklunar harvið enn meira ótryggar. Um avgjaldið hinvegin lækkar kann man vænta, at mot-

**Hagtøl hjá Jón Kragesteen (JK) kontra Sikkertrafik.dk (ST.DK)**

| Ár | JK | ST.DK | Munur |
|---|---|---|---|
| 1997 | 23 | 19 | 4 |
| 1998 | 27 | 21 | 6 |
| 1999 | 43 | 26 | 17 |
| 2000 | 36 | 24 | 12 |
| 2001 | 12 | 12 | 0 |
| 2002 | 24 | 24 | 0 |
| 2003 | 25 | 25 | 0 |
| **Tils.** | **190** | **151** | **39** |

Her tosa vit um eina lækking uppá 20% yvir bert 7 ár. So Føroya-MC hevur, bert við at rætta nøkur tøl, gjørt tað nógv tryggari í ferðsluni og so enntá í Danmørkini!

Nú er tað einaferð soleiðis við hagtølum, at ein kann fáa tað burturúr teimum sum ein vil, bara ein setur tey upp á rættan hátt.

M.a. kemur JK fram til, at tað skal vera 16 ferðir vandamiklari at koyra á motorsúkklu enn í bili. Hetta er grundað á, at tað eru 10,2 mio. koyrdir km millum hvørja bilvanlukku og bert 0,6 mio. koyrdar km millum hvørja motorsúkkluvan-

orsúkklunar verða yngri og harvið nógv tryggari, men vit halda tó, at ein sera týdningarmikil partur av at fáa tryggari ferðslu er upplýsing.

At Føroya-MC meldaðu seg sum lim í RFF í ´01 var ikki av tilvild...tað var fyri at betra um trygdina, og eisini koma við okkara vitan á hesum økinum. Vit vilja hervið biða RFF um ein fund, har báðir partar kunna legga síni sjónarmið fram, og har báðir partar og Føroya fólk vónandi fara at vinna nakað viðv. ferðslutrygdini.